## Fýra standa fyri vali

Tá 29. aðalfundurin hjá FSF er á skránni tann 1. mars, standa fýra starvsnevndarlimir fyri vali. Óli Holm forseti hevur stitið sítt næsta tvey-ára skeið, og higar til hevur eingin annar melda seg á banan til eitt stríðsval. Tað var talan annars um fyri tveimum árum síðani, tá Birgir Enghamer vildi bjóða sitandi forsetanum av. Hartil standa Høgni í Stórustovu, Rúni Heinesen og Magnus á Stongum fyri vali.

## Klaksvíkarkappingin er til reiðar

Tann 28. desember varð lutur kastaður um, hvussu spælast skal í ársligu Klaksvíkarkappingini í fótbólti. Her dystast umframt KÍ tey trý liðini, sum í fjør endaðu fremst í Formula-deildini, og eru hesi NSÍ, EB/Streymur og B36. Lutakastið lagaði seg soleiðis, at B36 og EBS/treymur spæla aðra hálvfinaluna, meðan KÍ og NSÍ dystast í hinari. Hálvfinalurnar verða spældar 1. mars, og sunnudagin 2. mars verður so finala og dystur um 3. og 4. plássið.

# Tvíburar til royndarvenjingar

**Herfyri varð greitt, at tvíburarnar Jóhan og Ásbjørn V. Gunnarsson fara til royndarvenjingar í Danmark. Ferðirnar eru fyriskipaðar av leikaraumboðsmanninum, Jákupi í Stórustovu**

FÓTBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

- Hetta er nakað, vit báðir hava havt hug til í eina tíð, og nú høvi bíðst, taka vit sjálvandi av, sigur ein spentur Jóhan V. Gunnarsson, ið saman við tvíburabróður sínum, Ásbjørn, fer til Danmarkar til royndarvenjing í trimum feløgum.

### Klárir at taka stigið

Brøðurnir báðir vórðu lidnir sum matematiskir studentar úr Hoydølum í 2006, og síðani hava teir fingið sær ymsar starvsroyndir. Men nú eru teir so klárir at koma víðari. – Nú er ein tíð liðin, síðan vit vórðu lidnir við studentaskúlan, so nú er tíð at koma víðari, sigur ein avgjørdur Ásbjørn, og leggur afturat, at teir eins væl kunnu spæla fótbólt, meðan teir leita sær eftir víðari lestrarleiðum. Teir hava báðir ætlanir um at kanna lestaramøguleikarnar, meðan teir eru í Danmark.



*Ásbjørn vísir kynstur síni*

### Trý feløg áhugaði

Feløgini, ið fáa føroysku tvíburarnar á vitjan í næstum eru AB, Frem og Brøndby. Fyrst fara báðir til AB, og síðani fara teir hvør sær. Ásbjørn og Jóhan fara ávíkavist til Frem og til Brøndby.

Av teimum trimum hevur AB víst størstan áhuga, og man tað óivað vera orsakað góðu úrslitini fyri U-21 landsliðið hjá Føroyum, at teir hava opnað eyguni fyri evnaríku unglingunum.

### Fleiri ávegis

Jákup í Stórustovu, ein av føroysku leikaraumboðsmonnunum veit at siga, at fleiri ungir føroyskir leikarar eru ávegis til royndarvenjingar. Hann veit at siga at nakrir eru á veg til Onglands og nakrir til Danmarkar. So spennandi er at fylgja við í næstum, um nakað fer at spyrjast burturúr. Vit ynskja teimum í øllum førum alt tað besta, og góðan byr.



*Johan í dysti fyri B36*

# Bruce fekk góða føðingardagsgávu

**Wigan venjarin kundi neyvan havt ynskt sær betur gávu, tá lið hansara megnaðu at fáa javnleik á útivølli móti Liverpool í gjárkvøldið. Aðrastaðni vunnu Blackburn, City og Bolton**

FÓTBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*



Í gjárkvøldið vóru Wigan á vitjan hjá Liverpool, og har væntaðu teir sær onki serligt, men ørðvísi skuldi gangast teimum.

### Fyrsta stigið

Wigan hevði áðrenn í gjárkvøldið, spælt fimm dystir móti Liverpool, og undan dystinum í gjár var fyrsta málið hjá Wigan enn á láni. Allir fimm undanfarnu hava endað við sigri til teir reyðu. Men í gjárkvøldið vístu Wigan at Liverpool eru ov sløsutir frammanfyri málmeskunum. Og samstundis fingu teir skavað sær eitt sera kærkomið stig í skjáttuna.

### Góð gáva

Venjarin hjá Wigan, Steve Bruce, ið á sinni spældi í verjuni hjá Manchester United, er júst vorðin 47 ár, og neyvan kundi hann ynskt sær betur gávu, enn eitt stig á útivølli móti Liverpool. Tað stóð á gomlum naglum, tá Liverpool pressaðu móti einum "drepara-máli" til 2-0, men Wigan verjan og málverjin høvdu hepnið við sær og kendu sína vitjunartíð í hinum endanum, tá Titus Bramble høgdi úr 16 metrum. Málið hjá Liverpool skoraði Fernando Torres.

### City, Blackburn og Bolton

Hinir trýggir dystirnar í gjárkvøldið endaðu við sigri til favorittarnar. Á útivølli vunnu Manchester City sannførandi móti Newcastle, tá teir skoraðu eitt mál í hvørjum hálvleiki.

Evnaríki brasiliumaðurin, Elano, er sera væl dámdur í Onglandi, og hann má hava gjørt sær ein beina í gjár, tá hann hegnisliga skapti eina vandamikla støðu og beindi bóltinum í einum bleytum boga, í hornið, handa ung Joe Hart í City málinum.

Aðrastaðni vunnu bæði Blackburn og Bolton 1-0 sigrar á heimavølli. Málini skoraðu ávíkavist McCarthy og Giannakopoulos.

**Enska Premier League**

| | | | | | | | | v mál | t mál | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | d | v | - | j | - | t | mál | mál | +/- | stig |
| 1 | Arsenal | 21 | 15 | - | 5 | - | 1 | 42 | 16 | 26 | 50 |
| 2 | Man Utd. | 21 | 15 | - | 3 | - | 3 | 38 | 11 | 27 | 48 |
| 3 | Chelsea | 21 | 13 | - | 5 | - | 3 | 33 | 16 | 17 | 44 |
| 4 | Man City | 21 | 11 | - | 6 | - | 4 | 29 | 22 | 7 | 39 |
| 5 | Liverpool | 20 | 10 | - | 8 | - | 2 | 34 | 13 | 21 | 38 |
| 6 | Everton | 21 | 11 | - | 3 | - | 7 | 37 | 22 | 15 | 36 |
| 7 | Aston Villa | 21 | 10 | - | 6 | - | 5 | 37 | 27 | 10 | 36 |
| 8 | Portsmouth | 21 | 9 | - | 7 | - | 5 | 31 | 20 | 11 | 34 |
| 9 | Blackburn | 21 | 9 | - | 6 | - | 6 | 28 | 28 | 0 | 33 |
| 10 | West Ham | 20 | 8 | - | 5 | - | 7 | 25 | 19 | 6 | 29 |
| 11 | Newcastle | 21 | 7 | - | 5 | - | 9 | 27 | 33 | -6 | 26 |
| 12 | Tottenham | 21 | 6 | - | 6 | - | 9 | 42 | 38 | 4 | 24 |
| 13 | Reading | 21 | 6 | - | 4 | - | 11 | 29 | 44 | -15 | 22 |
| 14 | Bolton | 21 | 5 | - | 5 | - | 11 | 23 | 32 | -9 | 20 |
| 15 | Middlesbr. | 21 | 5 | - | 5 | - | 11 | 18 | 35 | -17 | 20 |
| 16 | Birmingham | 21 | 5 | - | 4 | - | 12 | 22 | 32 | -10 | 19 |
| 17 | Wigan | 21 | 4 | - | 5 | - | 12 | 21 | 37 | -16 | 17 |
| 18 | Sunderland | 21 | 4 | - | 5 | - | 12 | 20 | 40 | -20 | 17 |
| 19 | Fulham | 21 | 2 | - | 9 | - | 10 | 22 | 37 | -15 | 15 |
| 20 | Derby | 21 | 1 | - | 4 | - | 16 | 10 | 46 | -36 | 7 |

**Úrslitini í gjárkvøldið vórðu:**

| | |
|---|---|
| Blackburn-Sunderland | 1-0 |
| Bolton-Derby | 1-0 |
| Liverpool-Wigan | 1-1 |
| Newcastle-Man City | 0-2 |